# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Danmark og Noreg bresta saman í kvøld

**Dystirnir millum Danmark og Noreg eru millum størstu klassikkarnar í kvinnuhondbólti**

HONDBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*heris@sosialurin.fo*

Í kvøld 19.15 skulu Noreg og Danmark spæla enn ein avgerandi dyst í einum endaspæli. Tær hava mangan møtst fyrr, og mangar á báðum liðum eru liðfelagar í bæði donsku og norsku kappingini. Fyri Danmark hevur tað alstóran týdning at fáa stig í kvøld, tí tær hava bert eitt stig við sær í høvuðsumfarið, meðan Noreg hevur 3 stig.

## Fara at stríðast

Venjarin hjá Danmark, Jan Pytlick er so beinharður í sínum metingum, at hann metir, at danska liðið má vinna allar tríggjar dystirnar í høvuðsumfarinum, fyri at kunna vinna seg í hálvfinaluna leygardagin.

- Ímóti Noregi fara vit at stríðast so nógv, at blóðið fer at flóta. Og undirstrikar hann har við, at hóast sína favorittstøðu, so skal Noreg ikki vænta sær nakran avgerandi dyst. Ein av fremstu donsku spælarunum, Rikke Skov er eisini greið yvir, hvat skal til:

- Vit koma at gera alt hvat vit megna fyri at vinna dystirnar í høvuðsumfarinum, soleiðis at vit røkka hálvfinaluni. Dystirnir ímóti Noregi eru nakrir klassikkarar, og eru altíð góðir, frá byrjan til enda. Sjálv eri eg ógvuliga tendrað.

## Danir eru desperatir

Norski spælarin, Kristine Lunde heldur, at ein kann loyva sær at siga, at tær á danska liðnum eru desperatar. – Tær mugu jú fáa tey stigini, sum eru at spæla um, so tað kann eina væl siga. Í norsku leguni hava tey verið mest upptikin av at sleppa undan smittuvandum. Ein ítróttarjournalistur, sum møtti á einum tíðindafundi hjá norska liðnum, varð stillisliga beindur út um dyr, tí hesin hostaði so illa.

- Vit vita av royndum, at tað er sera týdningarmikið hjá okkum at royna at halda okkum burtur frá krími og hosti. Hetta segði norski venjarin, Marit Breivik við norsku pressufólkini.



*Jan Pytlick metir, at hansara spælarar skulu vinna allar dystirnar í høvuðsumfarinum, um tey skulu hava møguleika at vinna seg víðari til hálvfinalurnar*
*Mynd: Polfoto/AP*

**Høvuðsumfarið**

**Bólkur I**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Rumenia | 2 | 2 | - | 0 | - | 0 | 54 | 46 | 8 | 4 |
| 2 | Noreg | 2 | 1 | - | 1 | - | 0 | 54 | 41 | 13 | 3 |
| 3 | Spania | 2 | 0 | - | 2 | - | 0 | 45 | 45 | 0 | 2 |
| 4 | Danmark | 2 | 0 | - | 1 | - | 1 | 51 | 53 | -2 | 1 |
| 5 | Ungarn | 2 | 0 | - | 1 | - | 1 | 47 | 53 | -6 | 1 |
| 6 | Ukraina | 2 | 0 | - | 1 | - | 1 | 44 | 57 | -13 | 1 |

**Bólkur II**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Týskland | 3 | 3 | - | 0 | - | 0 | 90 | 71 | 19 | 6 |
| 2 | Russland | 3 | 2 | - | 1 | - | 0 | 91 | 68 | 23 | 5 |
| 3 | Kroatia | 3 | 1 | - | 0 | - | 2 | 99 | 98 | 1 | 2 |
| 4 | Svøríki | 3 | 0 | - | 2 | - | 1 | 62 | 73 | -11 | 2 |
| 5 | Makedonia | 3 | 1 | - | 0 | - | 2 | 77 | 97 | -20 | 2 |
| 6 | Hvítarussland | 3 | 0 | - | 1 | - | 2 | 81 | 93 | -12 | 1 |

# Sviar bukaðir

**Týskland og Russland hava annað beinið í hálvfinaluni**

HONDBÓLTUR
*Heri Simonsen*
*Heris@sosialurin.fo*

Sum úrslitini lagaðu seg í bólki 2 ígjár, so er nógv, sum talar fyri, at Týskland og Russland verða liðini, sum vinna seg víðari úr bólki 2. Liðini møtast ikki innanhýsis fyrr enn hósdagin, og tá kunnu tey longu hava tryggjað sær tey tvey ovastu plássini í bólki 2. Svensku kvinnurnar høvdu tørv á minst einum stigi fyri at halda lív í vónini, um at røkka einum hálvfinaluplássi.

## Aftanfyri 0-9

Men longu tíðliga í dystinum stóð stórtap í hondum hjá svenska liðnum. Týskland førdi 9-0, áðrenn Svøríki fekk sítt fyrsta mál, og varð talan um eitt katastrofalt álopsspæl hjá Svøríki. Svenska liðið, sum hevði sum taktiskt mál at neutralisera týska stórskjúttan, Grit Jurack hevði onga eydnu við hesum, og bara fyrstu løtuna skeyt Jurack 5 mál. Svøríki fekk tó arbeitt seg uppá 11-15, sum varð hálvleiksstøðan. Men í 2. hálvleiki dróg Týskland aftur frá svensku kvinnunum, og gjørdist munurin 11 mál, tá alt varð liðugt. Svøríki skal vinna á bæði Kroatia og Makedonia, og hini úrslitini skulu laga seg, um Svøríki skal enda millum tvey tey ovastu liðini í bólkinum. Svøríki spælir ímóti Makedonia mikukvøldið, og hóskvøldið spæla tær ímóti Kroatia.

**FAKTA**
*Úrslitini í bólki 2 ígjár:*
Hvítarussland - Kroatia
35 - 43
Svøríki - Týskland
22 - 33
Russland - Makedonia
43 - 24